Eysturkommuna

# Fundarinnkalling

## Býráðið

**Dagfesting:** 15.12.2022 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Katrin Kjartansdóttir
Magnus Skoralíð
Marjun Andreasardóttir
Rúni Justinussen
Marita Klein Joensen
Petur Súni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari:


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 57/22 | 22/00405-1 | Broyting av býarplani í Leirvík matr. nr. 426c | 3 |
| 58/22 | 22/00426-1 | 22/00426 - frágreiðing og tilmæli til mál - Uppskot um, at foreldur sleppa frá ansingargjaldið fyri desember 2022 | 4 |
| 59/22 | 22/00429-9 | Gongubreyt og sniðgøta framvið Kráarvegi í Leirvík | 6 |
| 60/22 | 22/00381-3 | Umsókn um keyp av lendi matr. nr. 147d LV | 8 |
| 61/22 | 22/00415-3 | Dagføring av mannagongd og stuðulsreglugerð til mentanar- og frítíðarvirksemi | 9 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 62/22 | 21/00235-2 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00235 - Reglugerð til konto 614 - 5490 - Stuðulskonto til fríðkan (borgarainitiativ) | 10 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 57/22 Broyting av býarplani í Leirvík matr. nr. 426c

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 08.12.2022 | 35/22 | 22/00405-1 |
| 2 Býráðið | 15.12.2022 | 57/22 | 22/00405-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ynski er um at broyta part av matr. nr. 426c, umframt matriklar 399, 400, 401, 402, 403, 404, 405 og 406 frá "J, Landbúnaðarøki" til "B1, Alternativ íbúðarbygging"<br><br>Hetta gevur møguleika til alternativa íbúðar- og húsabygging.<br><br>Markeraða øki á kortskjal "Broyting av býarplaninum í Leirvík matr. nr. 426c" vísur øki sum fevnir um matriklar 426c, 399, 400, 401, 402, 403, 404, 405 og 406, ið ynski er at broyta til "B1, Alternativ íbúðarbygging" |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at góðkenna uppskotið um at broyta býarplanin fyri Eysturkommunu í Leirvík smb. skjølum í málinum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 08. december 2022**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 58/22 22/00426 - frágreiðing og tilmæli til mál - Uppskot um, at foreldur sleppa frá ansingargjaldið fyri desember 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 17.11.2022 | 23/22 | 22/00426-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 21.11.2022 | 43/22 | 22/00426-1 |
| 3 Býráðið | 24.11.2022 | 56/22 | 22/00426-1 |
| 4 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 08.12.2022 | 24/22 | 22/00426-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 12.12.2022 | 44/22 | 22/00426-1 |
| 6 Býráðið | 15.12.2022 | 58/22 | 22/00426-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umhvørvis – og trivnaðarnevndin leggur fram uppskot um, at foreldur sleppa frá ansingargjaldinum fyri desember 2022. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Fyri vøggu- og barnagarðsbørn t.v.s. teimum, sum ganga á dagstovn í kommununi verður kostnaðurin kr. 263.000.<br>Um Frítíðarheimið og Skúlaspírnin eisini verða tikin við, er samlaði kostnaðurin áleið kr. 363.000 |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 17. november 2022**
Mælt verður til, at foreldur, sum eiga børn á dagstovni, frítíðarheimið og Skúlaspírnanum í kommununi, sleppa frá aningargjaldinum fyri desember 2022.

**Fíggjarnevnd 21. november 2022**
Fíggjarnevndin mælir frá at taka undir við tilmælinum hjá umhvørvis- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 24. november 2022**
Hanna Jensen setti fram uppskot um at útseta málið til støðutakan til komandi byráðsfund fyri at kanna málið nærri.

Fyrst bleiv atkvøtt um at útseta málið til komandi fund, og atkvøt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Hjalti Dalheim, Magnus Skoralíð, Hanna Jensen, Katrin Kjartansdóttir, Petur Súni Jacobsen og Rúni Justinussen

**Atkvøður ímóti:**
Marita Klein Joensen og Marjun Andreasardóttir

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 08. desember 2022**
Mæla til at halda fast við samtyktin dagf. 17. november 2022

**Fíggjarnevnd 12. december 2022**
Mæla til at halda fast við samtyktina dagf. 21. november 2022

## 59/22 Gongubreyt og sniðgøta framvið Kráarvegi í Leirvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 08.12.2022 | 36/22 | 22/00429-9 |
| 2 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 08.12.2022 | 25/22 | 22/00429-9 |
| 3 Fíggjarnevnd | 12.12.2022 | 45/22 | 22/00429-9 |
| 4 Býráðið | 15.12.2022 | 59/22 | 22/00429-9 |

**Málslýsing:**

Í sambandi við arbeiðið uppá Kráarlundina í er byrja, hevur arbeiðstakarin spurt um hvar ymisk rør liggja í lendinum. Í hesum sambandi kom hugskotið, at tað kundi verið  áhugavert at fingið eitt tilboð frá arbeiðstakanum, um at gera gongubreytina millum Kráarveg og Kráarlundina og í forleingilsi av gongubreytini at gera eina sniðgøtu sum verður bundin í verandi sniðgøtu við rundkoyringina á Kráartanga.

Tilboðið frá Sp/f Vakurt er kr. 385.515,68 uttan MVG.

Í tilboðnum er eisini regnvatnsbrunnur, rør og asfalteringsarbeiði.

Okkara meting er uml. kr. 300.000,00 uttan MVG

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Tann parturin av tilboðnum sum hoyrir til gongubreyt/vegin er kr. 271.838,56 uttan MVG.

Tann parturin av tilboðnum sum hoyrir til sniðgøtuna er kr. 113.677,12 uttan MVG.

**Tilmæli**

Mælt verður til at taka av tilboðnum hjá Sp/f Vakurt uppá 385.515,68 kr.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 08. december 2022**

Meirilutin í Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at taka av tilboðnum hjá Sp/f Vakurt.

Marjun Andreasardóttir tekur støðu á býráðsfundinum.

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 08. desember 2022**
Mæla til at bíða við støðutakan, inntil verkætlanin er komin longur ávegis.

**Fíggjarnevnd 12. december 2022**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

## 60/22 Umsókn um keyp av lendi matr. nr. 147d LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 08.12.2022 | 34/22 | 22/00381-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 12.12.2022 | 47/22 | 22/00381-3 |
| 3 Býráðið | 15.12.2022 | 60/22 | 22/00381-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Søkt verður um at keypa eitt jarðarstykki burturav matrikul 147d í Leirvík at leggja saman við matr. nr. 161 omanfyri.<br><br>Talan er um part av frílendinum, sum liggur í bústaðarøkinum B í býarplaninum fyri Eysturkommunu.<br><br>Ætlanin er at drena økið, planta trø og velta eplir. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at stykkið verður selt umsøkjarnum smb. skjølum í málinum. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 08. december 2022**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 12. december 2022**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 61/22 Dagføring av mannagongd og stuðulsreglugerð til mentanar- og frítíðarvirksemi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 16.11.2022 | 49/22 | 22/00415-3 |
| 2 Býráðið | 15.12.2022 | 61/22 | 22/00415-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 21.11.2022 | 41/22 | 22/00415-3 |
| 4 Fíggjarnevnd | 12.12.2022 | 48/22 | 22/00415-3 |
| 5 Mentanarnevndin | | | 22/00415-3 |
| 6 Býráðið | | | 22/00415-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Á býráðsfundi 27. oktober 2022 var tillagaður mentanarpolitikkur samtyktur. Hendan tillaging fevnir um dagføring av mannagongd og stuðulsreglugerð til mentanar- og frítíðarvirksemi. Verður reglugerðin broytt, má umsóknarblaðið broytast samsvarandi.<br><br>Ískoyti 23.11.2022:<br>Víst verður til uppskot um dagførda stuðulsreglugerð (Stuðulsreglugerð – uppskot). |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

### Mentanarnevndin 16. november 2022

Við fyriliggjandi broytingum mælir mentanarnevndin til at stuðulsreglugerðin og tilhoyrandi oyðublað verða broytt.

### Fíggjarnevnd 21. november 2022

Málið tikið av skrá

## 62/22 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00235 - Reglugerð til konto 614 - 5490 - Stuðulskonto til fríðkan (borgarainitiativ)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 20.05.2021 | 18/21 | 21/00235-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 25.05.2021 | 36/21 | 21/00235-2 |
| 3 Býráðið | 27.05.2021 | 43/21 | 21/00235-2 |
| 4 Umhvørvis - og trivnaðarnevndin | 08.12.2022 | 26/22 | 21/00235-2 |
| 5 Fíggjarnevnd | 12.12.2022 | 46/22 | 21/00235-2 |
| 6 Býráðið | 15.12.2022 | 62/22 | 21/00235-2 |

**Málslýsing:**

Á fíggjarætlanini fyri 2021 er avsettar kr. 50.000 til Stuðulskonto til fríðkan (borgarainitiativ).

Ætlanin við hesi játtan er, at borgarar í Eysturkommunu kunnu søkja um fíggjarligan stuðul til smærri alment gagnligar verkætlanir.

Umhvørvis – og trivnaðarnevndin, sum varðar av hesi konto ger uppskot um reglugerð, sum skal lýsa treytirnar fyri, at borgarar kunnu søkja og fáa stuðul av hesi konto.

---

**07. desember 2022**

Uppskot til støðutakan at tillaga og gera ískoyti til reglugerðin, sum var samtykt á býráðsfundi 27. Mai 2021. Ískoyti er soljóðandi:

*"Um upphæddin, játtað verður er hægri enn 30.000,00 kr. skal umsóknin viðgerast av fíggjarnevndini og býráðnum".*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Peningur er avsettur á fíggjarætlanini til endamálið.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at Umhvørvis – og trivnaðarnevdin samtykkir verandi uppskot við teimum broytingum, sum gjørdar verða á nevndarfundinum 20. mai 2021

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 20. mai 2021**
Mæla til at taka undir tilmælinum hjá umsitingini

**Fíggjarnevnd 25. maj 2021**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umhvørvis- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 27. maj 2021**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umhvørvis- og trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

**Umhvørvis - og trivnaðarnevndin 08. desember 2022**
Mæla til at taka undir við broytingin í reglugerðini, sum víst verður til í málslýsingini dagf. 07. desember 2022.

**Fíggjarnevnd 12. december 2022**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umhvørvis- og trivnaðarnevndini.

fundurin lokin

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen